# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Prógv**

12. oktober hevur Joan Højsted, Klaksvík, fingið prógv sum sosial- og sunnheitshjálpari í Ålborg.

**Føðingar**



8. oktober fekk Kristina eina lítla systur, hon var 54 cm long og vigaði 3975 g. Foreldur teirra eru Rannvá Gásdal og Dánial Haraldsen og tey búgva øll í Sørvági.

30. september fingu Malene og Símun Jacobsen, Hvalba, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3690 gr.

8. oktober fingu Maria á Lakjuni Simonsen og Bjørn Simonsen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4700 gr.

12. oktober fingu Helena M. og Dávur P. Jaocbsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3400 gr.

12. oktober fingu Lise H. Ofstad og Bjarni Mikkelsen, Velbastaður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3690 gr.

12. oktober fingu Elin Jacobsen og Sunleif Pattinson, Funningsfjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

13. oktober fingu Fríða og Jógvan Højbro, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4070 gr.

13. oktober fingu Turið og Aage Dyssegaard, Odense, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3858 gr. Hon hevur fingið navnið Freja.

13. oktober fingu Sonja Hentze og René Müller Jensen, Sahl, Bjerringbro, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3520 g.

15. oktober fingu Jannie Hammer og Bárður Højgaard, Kollafjørður, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3320 gr.

15. oktober fingu Gunnvør Jacobsen og Zakarias Bech, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3325 gr.

17. oktober fingu Birna Gaard og Magni Jakobsen, Argir, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

17. oktober fingu Anna Jóna Olsen og Leif Ellingsgaard, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4150 gr.

18. oktober fingu Petur og Judy við Gjónna, Fuglafjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3150 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 20. oktober kl. 15.00, giftast í Skála kirkju Beinta Karbech Hansen og Poul Andreas Hansen, Skála. Veitslan verður fyri innboðnum í Bygdarsalinum á Skála. Vinarligast seti hesa lýsingina í blaðið 18, 19 og 20 oktobur.

Leygardagin 20. oktober giftast í Vestervang kirke í Helsingør Bette Rein úr Havn og Kasper Krebs úr Helsingør. Brúdleypsadr.: Nørrevej 80, 3070 Snekkersten, DK.



Leygardagin 20. oktober gifta vit okkum. Vígslan verður kl. 13 í Oslo 3. korps Nordregate 25, Oslo. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 15.00. Brúdleyps adr.: Frelsesarmeens Offiserskole, Brendsrudtoppen 40, Oslo.
**Wenche Walderaug, Ålesund og Poul Heri Midjord, Vágur**



Leygardagin 20.10.07 giftast Maria Olsen, Gøta og Hjalmar Dalbúð, Runavík. Vígslan verður í Filadelfia í Gøtu kl. 13.00. Veitslan verður fyri innboðin í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.

# Marin Kristina Hentze Rasmussen 75 ár





Mánadagin tann 22.oktober verður Marin 75 ár.

Tað gleðast vit øll um.

Marin er fødd 22.10.1932. Foreldur hennara vóru Petur og Tomasia Rasmussen. Hon er elst av fimm syskjum. Aftan á hana koma Petur Sigurd, Martha, og síðani tvíburðarnir Sjúrður og Sólrun.

Marin er av fittastu konum, altíð blíð, prátingarsom og innbjóðandi.

Tann 09.04-1962 byrjaði Marin hjá P/f Poul Hansen. Tað sigst, at hon byrjaði sum avloysara fyri lítlusystir sína Sólrun, sum tá fór í farloyvi. Ta tíðina, Marin arbeiddi har var hon í bókhaldinum, og eisini var hennara arbeiðsøki inn- og útgjaldingar, kassin og avstemming. Hon var eitt álitisfólk og fekk nógv á skaftið, og mangan hevði hon nógv at gera. Marin gavst hjá P/f Poul Hansen 31.05-2000.

Um tú kemur á hennara gátt á Gundadalsvegnum, er tað altíð eitt smíl, sum er tað fyrsta tú møtir. Síðani kemur kaffi á borðið og altíð eigur hon okkurt gott at bjóða afturvið

Marin hevur eingi børn, men ikki minni enn 39 ommu-og abbadiddubørn

Í kjallaranum í síni lítlu íbúð trívist Marin væl. Allarhelst man tað vera, tí ikki er langt millum húsini, og oman gjøgnum Gundadal, búgva hannara trúgvu vinkonur Anna, Hanna og Anna. Tað er sera áhugvert og stuttligt at síggja og hoyra hesar frísku damurnar sita og práta saman í fleiri tímar. Mangan spáka tær ein túr millum húsini og hitta hvørja aðra til ein drekkamunn, hugnaligt prát og stuttligar søgur. Onkuntíð sita tær og spæla Gekk, og tá er lív í stovuni.

Men eisini man tað vera ommudiddusonur hennara, ið hon er so ógvuliga góð við, sum ger at henni dámar so væl, at búgva í Gundadali. Mangan fær hann okkurt gott frá henni, og fleiri eru morgnarnir har tey hava sitið og práta, og etið morgunmat saman, niðri í hennara lítla heita køki.

Góða mostir og ommudidd. Vit ynskja tær hjartaliga tillukku á tínum 75 ára degi.

Takk fyri allar hugnaligar løtur, alla hjálp og gestablíðni, ið tú gevur okkum.

Sum sól á myrkum degi
Tú gevur okkum gleði

Tú er ein gyltur klettur, við heitum hjarta, og kundu vit ikki verið teg fyri uttan.

Takk fyri alla gleði, tú gevur ommudiddusoninum og okkum.

Kærar heilsur

**Vit trý á loftinum**

# Finnbogi Niclasen seksti



Sunnudagin 21. oktober 2007 verður ein kendur Sørvingur, Finnbogi Niclasen 60 ár. Finnbogi er føddur og uppvaksin á Tvøroyri, sonur til Niels hjá Rudolf og Ellu í Øðravík, hann er næstyngstur av átta systkjum, har tvey ikki eru millum okkum meira.

Barnaárini vóru traðkað á Tvøroyri, og saman við øllum tí ein drongur av bygd gjørdi, var áhugin fyri tónleiki eisini til steðgar, og ikki minst at gloyma tvey ting, sum Finnbogi gekk nógv uppí, spældi til dans í nøkur ár saman við Óla Jákup Lindberg, Rudolf Niclasen sála, og fleiri øðrum, og skótaarbeiði, hetta vóru dagar sum vit framvegis gleðast um.

Finnbogi tók realprógv í Tvøroyrar skúla, og eftir lokna skúlatíð varð farið til Íslands at arbeiða og seinni varð farið til skips eisini.

Í seinnu helvt av trússinim fór Finnbogi út at sigla sum stýrimansnæmingur hjá Maersk.

Í 1970 var farið á stýrimans- og skipsføraraskúla í Havn, og í 1972 var so aftur fari í útisigling.

Í 1973 kom hann so at sigla við tí fyrsta bingjuskipinum hjá Maersk Svendborg Mærsk, og var við í allari mennigini av bingjuskipum hjá reiðarínum, men familjan og børn drógu heim, og í 1979 fekk hann so starv hjá Statens Luftfartsvæsen sum leiðari av Vága Floghavn, og rekur hann hetta starv framvegis, eisini eftir at flogvøllurin er blivin føroyskur, og kann eg ímynda mær, at hann er spentur um at fara ígongd við tær útbyggingar, sum nú liggja fyri framman á Vága Floghavn.

Undir útbúgving í Havn fann Finnbogi so konu úr Nólsoy, Edna dóttir Jákup og Gunhild Joensen, tey eiga trý børn og seks abba og ommubørn sum tey eru ógvuliga glað fyri.

Edna og Finnbogi hava stóran áhuga í urtagørðum og at dyrka grønmeti, og er urtagarðurin hjá teimum eitt satt prýði.

Nú eftir at hava búleikast í nærum 30 ár í Sørvági, kann mann gott siga at hann er Sørvingur, kanska ikki heilt tí at suðuroygarmáli hevur hann ikki gloymt.

Finnbogi er virkin í fleiri felagsskapum, stovnaði saman við øðrum Lions Club Vágar – dansifelagið Upp á tá og dámar honum væl fótbólt serliga tá ið SÍ spælir.

Góði vinmaður, vónandi fær tú ein góðan dag, eg hoyri at tú er burturstaddur føðingardagin, men ætlar at halda dagin seinni.

Heilsan

**Ein vinmaður**